ARBEIÐSEFTIRLITIÐ
Occupational Safety & Health Administration
Falkavegur 6, P.O. Box 1134, FO-110 Tórshavn, Faroe Islands, www.arb.fo
Tlf. +298 357811, Fax +298 357810, E-mail: arb@arb.fo

*Skrásetingar nr.:*
**K-G021-2**

Nr. 121 21. november 2005

# Kunngerð
# um
# gjøld fyri eftirlit v.m. hjá Arbeiðseftirlitinum

Við heimild í § 56, stk. 3 í løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi verður ásett:
**§ 1.** Fyri eftirlit og tænastur v.m., ið Arbeiðseftirlitið ger sambært ásetingum í arbeiðsumhvørvislóggávuni, tekur Arbeiðseftirlitið gjøld sbrt. §§ 2-11 í hesi kunngerð.

**§ 2.** Gjøld fyri eftirlit og trýstroyndir av dampketlum, smbrt. bekendtgørelse nr. 564 frá 22. december 1971 om dampkedelanlæg på landjorden, sum sett í gildi við kunngerð nr. 79 frá 17. august 1999 eru hesi:
Uppsetanareftirlit við dampketli, sbrt. § 11, stk. 4, nr. 3 í nevnda bekendtgørelse: kr. 4.100,-
Eftirlit av dampketli, sbrt. § 12, stk. 1 nr. 2 í nevnda bekendtgørelse,: kr. 3.600,-
Trýstroynd av dampketli sbrt. § 12, stk. 1, nr. 1 og sbrt. § 11, stk. 4, nr. 2 í nevnda bekendtgørelse: kr. 3.700,-

**§ 3.** Gjøld fyri eftirlit við lyftum v.m., sbrt. § 1 í kunngerð nr. 120 frá 21. november 2005 um ymsar eftirlitsuppgávur v.m., sum Arbeiðseftirlitið útinnir, eru hesi:
Eftirlit við fólka- og góðslyftum: kr. 2.530,-
Eftirlit við góðslyftum og lyftum til rørslutarnað, rullutrappum, byggilyftum o.l.: kr. 1.150,-
Eftirlit við lyftiútgerð (stroppar v.m.): kr. 2.000,-

**§ 4.** Gjøld fyri eftirlit av lyftiútgerð og spølum (kranar), sbrt. § 2 í kunngerð nr. 120 frá 21. november 2005 um ymsar eftirlitsuppgávur v.m., sum Arbeiðseftirlitið útinnir, eru hesi:

Eftirlit við:
1) Lastbilmonteraðum krana: kr. 2.024,- árliga.
2) Mobilkrana: kr. 2.415,- árliga.
3) Tornkrana: kr. 2.875,- árliga.
4) Traverskrana: kr. 3.220,- árliga.
5) Bátaspæl: kr. 600,-
6) Lyftiútgerð (stroppar v.m.): kr. 2.000,- árliga.
7) Persónslyftu: kr. 1.500,- árliga.
8) Billyftu: 2.070,- árliga.

*Lógarheimild:*
§ 56, stk. 3 í løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi

*Útgivið fyrstu ferð:*
**21. november 2005**

*Seinastu broytingar:*
**12. januar 2009**

**§ 5.** Gjøld fyri prógv, sbrt. kunngerð nr. 59 frá 18. juli 1985 um loyvisbræv at koyra gaffiltrukk § 3, stk. 4 og § 5 í kunngerð nr. 120 frá 21. november 2005 um ymsar eftirlitsuppgávur v.m., sum Arbeiðseftirlitið útinnir, eru hesi:
Útskriva prógv (nýtt): kr. 1.000,-
Endurútskriva prógv: kr. 350,-
Umbýti av prógvi (frá øðrum landi): kr. 1.000,-

**§ 6.** Gjøld fyri eftirlit við trýstfløskum o.ø., sbrt. bekendtgørelse nr. 746 frá 26. november 1987 om trykbeholdere og rørsystemer under tryk, sum sett í gildi við kunngerð nr. 123 frá 23. oktober 1996, eru hesi:
Eftirlit við trýstílati, sbrt. § 41 og § 49, stk. 1 í nevnda bekendtgørelse: kr. 1.955,-
Eftirlit við fylgjandi trýstíløtum (sama dag): kr. 805,-
Eftirlit við uppsetan av rørskipanum, smbrt. § 67, stk. 2 í nevnda bekendtgørelse: kr. 3.220,-

**§ 7.** Gjald fyri góðkenning av sakkønum virki, sbrt. § 1, stk. 2, § 3 og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 120 frá 21. november 2005 um ymsar eftirlitsuppgávur v.m., sum Arbeiðseftirlitið útinnir, er kr. 3.300,- árliga.

**§ 8**. Gjald fyri góðkenning av spreingievnagoymslum, sbrt. § 1, stk. 7, § 3, stk. 1, § 4, stk. 2 og § 6, stk. 3 í kunngerð nr. 11. frá 30. januar 1980 um goymslur til spreingievni, er kr. 2.875,-

**§ 9.** Gjald fyri eftirlit av trukkum, sbrt. § 4, stk. 1í kunngerð nr. 120 frá 21. november 2005 um ymsar eftirlitsuppgávur v.m., sum Arbeiðseftirlitið útinnir, er kr. 1.000,- árliga.

**§ 10.** Gjald fyri ummæli, sbrt. § 7, stk. 2 í kunngerð nr. 8 frá 13. februar 2002 um innrætting av føstum arbeiðsplássum, sum Arbeiðseftirlitið letur, er kr. 2.500,-

**§ 11.** Gjald fyri loyvi til keyp av ethanoli, sbrt. § 2 í kunngerð nr. 80 frá 21. apríl 1993 um handil við ethanoli til tekniska nýtslu, sum Arbeiðseftirlitið gevur, er kr. 300,-

**§ 12.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið 21. november 2005

**Bjarni Djurholm (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

**PS:**
*Broytingar sambært kunngerð nr. 2 frá 12. januar 2009 um broyting í kunngerð um gjøld fyri eftirlit v.m. hjá Arbeiðseftirlitinum, eru sett inn her.*

*Arbeiðseftirlitið*